


# Mærsk byggir risastór boriskip til djúpt vatn

**Jan Müller**

09.10.2013 - 20:50

Oljan.fo

Danska oljufyritøkan Maersk Drilling, sum leingi hevur roynst væl á altjóða marknaðinum fyri boriskip og boripallar, hevur nú tikið eitt stórt stig víðari til at gerast partur av heimselituni, tá tað um oljuboring ræður. Felagið hevur bílagt fýra nýggj boriskip fyri góðar 14 mia. kr., sum teljast millum tey størstu í heiminum.

Fyrsta skipið er liðugt og skal til arbeiðis fyri ExxonMobil í Meksikanska Flógvanum í trý ár frá 2014. Tað fer at kosta ExxonMobil góðar 3 mill. kr. um dagin at leiga skipið.

Boriskipini eru 228 metrar long, 42 m breið og stinga 19 metrar. Tey kosta góðar 3 mia. kr. hvørt ella 14,3 mia. kr. tilsamans. Skipini kunnu arbeiða undir sera harðførum veðurviðurskiftum og á sera stórum havdýpi. Tey kunnu bora á 3,6 km. dýpi og 12 km. niður í undirgrundina.

Skipini verða bygd á Samsung skipasmiðjuni í Okpo í Suðurkorea og skulu nøkta stóra

framtíðar tørvin at finna olju og gass á stórum dýpi ymsa staðni kring heimin. Maersk, sum annars hevur drúgvar royndir at bora á grunnum vatni, fer nú av álvara út á djúpt vatn.

Mærsk Drilling hevur seinastu árini gjørt seg út til at arbeiða á djúpum vatni undir harðførum veðurlíkindum. Her finnast størstu avbjóðingarnar, men tað er eisini her flestu pengar eru at forvinna í hesum partinum av oljuvinnuni. Mærsk, sum hevur drúgvar royndir á oljuøkinum, er í løtuni við at menna eina vakstrarstrategi, har oljuleiting á djúpum vatni verður raðfest høgt.



